# Aftur rakettir úr Libanon

Minst tríggjar libanskar rakettir vórðu í morgun skotnar inn í Norðurísrael. Eingin fekk skaða. Ísraelska sjónvarpið sigur, at rakettirnar duttu niður tætt uttan fyri býin Kiryat Shmona, og fólk í býnum siga, at tey hoyrdu brestirnar. Hetta er aðru ferð í eina viku, ar Ísrael verður rakt av rakettum úr Suðurlibanon. Undir krígnum í 2006 sendi Hizbollah fleiri hundrað rakettir inn í Norðurísrael, men Hizbollah sigur seg ikki hava skotið nakrar rakettir inn í Ísrael síðani. Eygleiðarar halda tí, at tað er onkur palestinskur bólkur, sum hevur sent rakettir úr Suðurlibanon inn í Ísrael.



# Fleiri flugu frá Kastrup

21,5 milliónir ferðafólk omu og fóru um floghavnina í Kastrup í fjør, og tað er tað mesta nakrantíð. Vøksturin samborið við 2007 var tó ikki millum tvey og fýra prosent, sum leiðslan hevði væntað, men bara 0,6 prosent. At ferðafólkatalið vaks minni enn væntað komst sambært leiðsluni í Kastrup av altjóða fíggjarkreppuni og trupulleikunum hjá Sterling, sum fór á húsagang seinasta heyst. Leiðslan kann so ugga seg við, at flestu av hinum stóru floghavnunum í Evropåa høvdu færri ferðafólk í fjør enn í 2007.

# Prísurin fyri globalisering



Sosialurin
Nr. 9 • Mikudagur • 14. januar 2009 • 83. árg. • Kr. 20,00

Støðan á Setrinum er katastrofal
Síða 4-5

Skuld ávirkar ikki kappingarføri
Síða 8

Harley setir gaggurnar eftir 21 ár
Ítr 25

Starvsmannafelagið: Snorri Fjalsbak hóttir við avleiðingum
Síða 7

Tað verða eftir øllum at døma íslendingar, sum fara at umvæla Landssjúkrahúsið. Íslendingar kunnu gera arbeiðið nógv bíligari enn føroyingar. - Íslendingar kunnu gera sum teir vilja her, meðan teir alla tíðina megna at seta smáar forðingar upp fyri okkum í Íslandi, sigur Magnus Magnussen, formaður í Føroya Handverksmeistarafelag

ÍSLENDINGAR GERA LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Samskip
Yviri við Strond 23
Tel. 30 88 00
Fax. 30 88 01
torshavn@samskip.com
www.samskip.com
SAMSKIP

AIRPORT TAXI
Tú verður heintaður og koyrdur til dyrnar
... ómakaleyst
AUTO TAXI 31 1234 & 3x36

... tú fært tað munandi betri
við HTH-KØKUM
Køkstorgið
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
tel 35 93 00 · fax 35 91 00

FRÍGGJADAGIN 23. JANUAR
ÁRSINS LEIÐARADAGUR '09
HEIMURIN Í KREPPU
– hvussu koma vit styrkt út hinumegin?
Kom við - melda til nú!
Synergi - tel. 322355 - www.synergi.fo Synergi

*Mikudagin skrivaði Sosialurin um, at íslendingar fara at gera umvælingarnar til fyrsta byggistig á Landssjúkrahúsinum. Sambært føroyskari byggivinnu er hetta ein gongd, sum fer at halda fram, og at hetta skapar stórar trupulleikar fyri føroyska byggivinnu. – Hetta er ein fullkomin andsøgn, tá landið tosar um at skapa virksemi í krepputíðum, tí útlendingar fara við øllum, og peningurin fer beinleiðis av landinum, sigur Magnus Magnussen, formaður í Føroya Handverksmeistarafelagið*

**Jørgen Niclasen, landsstýrismaður við uttanríkismálum, er sannførdur um, at tað er ein fyrimunur hjá vinnulívinum at vera í einari harðari kapping. Tí heldur hann ikki, at Íslandssáttmálin er ein trupulleiki, nú íslendingar skulu gera fleiri stór arbeiðir í Føroyum**

**ARBEIÐSMARKNAÐUR**
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Hóast Magnus Magnussen, formaður í Føroya Handverksmeistarafelagi, í grein í Sosialinum mikudagin sigur, at Íslandssáttmálin er bláoygdur og skapar trupulleikar fyri føroyingar, so heldur Jørgen Niclasen ikki, at tað er soleiðis.

- Vil mann nakað í heiminum, má mann tola, at handil gongur báðar vegir. Tað er altíð ein fyrimunur fyri vinnulív at liggja í harðari kapping, so eg síggi ongan trupulleika í hesum, sigur uttanríkisráðharrin. Hann leggur afturat, at Íslandssáttmálin gongur báðar vegir, og at føroyskar fyritøkur hava gjørt stór arbeiðir í Íslandi.

Jørgen Niclasen vísir á, at tað ber til at gera avmarkingar í útbjóðingini, um mann endiliga vil føra ein protektionistiskan politik, sum hann orðar seg.

## Sáttmálin hevur manglar

Jørgen Niclasen er hinvegin samdur við Jóhani Dahl, sum heldur at Íslandssáttmálin hevur manglar.

- Tað sigur seg sjálvt, at tá ein sáttmáli er lutfalsliga nýggjur, so stinga ting seg upp alla tíðina, har mann skal avgera, um talan er um diskrimination ella bara lógir. Vit síggja tað við íslendsku fyritøkuni, ið skuldi innflyta vatn til Føroyar. Har sóu vit, at ov nógv at onkrum var í vatninum, sum gjørdi, at tað ikki helt føroyska lóggávu. Viðvíkjandi mjólkarúrdráttum sóu vit hinvegin, at íslendingar diskrimineraðu føroyingar eitt sindur, men hetta er komið upp á pláss, vísir Jørgen Niclasen á.

Hann leggur afturat, at hetta er størsti handilssáttmálin, sum íslendingar og føroyingar, hvør í sær, nakrantíð hava gjørt, og tí verða altíð nøkur ting mann má diskutera. Hann metir eisini, at ein positivur andi hevur verið alla tíðina, tá ivamál hava verið.

# Fakfelagið tekur tað upp

- Hetta er so ræðuliga mótsigandi. Vit tosa beinleiðis um at spræna pening av landinum. Øðrumegin tosar landsstýrið um, at mann skal halda virkseminum í gongd í landinum, meðan mann hinumegin fær útlendingar at gera alt arbeiðið, so pengarnir fara beint av landinum, sigur Magnus Magnussen, formaður í Føroya Handverksmeistarafelagi.

Hann greiðir somuleiðis frá, at hetta er nakað fakfelagið í samstarvi við Vinnuhúsið arbeiðir við í løtuni.

- Tey sita og nærlesa Íslandssáttmálan í løtuni, og so mugu vit bara síggja, hvat vit kunnu gera. Hetta er nakað, sum fyllir heilt nógv hjá okkum beint nú, tí vit mugu gera okkurt beinanvegin, staðfestir formaðurin í Føroya Handverksmeistarafelagi. Hann leggur afturat, at tað ikki er so løgið at íslendingar eru so bíligir, tí tímalønin hjá teimum er bara 90 krónur um tíman.

Hann greiðir somuleiðis frá, at longu í næstu viku verður okkurt at hoyra, um hvat tey fara at gera í hesum málinum, men nakað konkret sigur Magnus Magnussen seg ikki kunna koma inn á beint nú.

umhvørvisstovan
ENVIRONMENTAL AGENCY

ÍBÚÐ

Søkt verður eftir íbúð til eitt av okkara starvsfólki til 1. mars 2009

Umhvørvisstovan
Boks 2048 · Tlf. 342400
FO-165 Argir · us@us.fo
www.us.fo

Rigsombudsmanden på Færøerne

DANSK-FÆRØSK KULTURFOND

Opmærksomheden henledes på, at fristen for indsendelse af ansøgninger til Dansk-Færøsk Kulturfond er fastsat til den 1. marts 2009.

Der kan gives støtte til formål indenfor teater, film, musik og kunst, bogudgivelser, visse studierejser m.m. Der gives normalt ikke støtte til nordiske konferencer, skolerejser og lign. samt egentlige uddannelsesformål.

Dansk-Færøsk Kulturfond bestyrer også »Dansk-Færøsk Samfunds studierejselegat«. Legatet består af to portioner på 10.000,- kr. Den ene portion til en studierejse til Danmark for personer mellem 18 og 30 år. Studierejsen skal have et formål, der falder inden for Dansk-Færøsk Kulturfonds formål.

Ansøgninger skal sendes til fondens sekretær, afdelingsleder Lenna Hansen, Statsministeriet, Prins Jørgens Gård 11, DK-1218 København K.

Yderligere oplysninger om Dansk-Færøsk Kulturfond kan fås ved henvendelse til sekretæren, tlf. 0045 33 92 22 09, eller til Rigsombudet, tlf. 35 12 00.

Postboks 12 | FO-110 Tórshavn | Tel. 35 12 00
riomfr@fo.stm.dk | www.rigsombudsmanden.fo